# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 3. desember 2020
Mál nr.: 20/00398
Málsviðgjørt: JEK

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| *Stk. 9.* Persónur, ið er fevndur av eftirlønarskipan uttanlands sum partur av arbeiðssáttmála við arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, og har arbeiðið verður útint uttan fyri Føroyar, kann verða undantikin at rinda til eftirløn sbrt. hesi løgtingslóg, við atliti at inntøku, ið er forvunnin uttanlands. Umsókn skal sendast til TAKS, ið metir um, hvørt talan er um eftirlønarskipan, sum í nóg stóran mun tryggjar samansparara eitt nøktandi inntøkugrundarlag eftir pensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur. | § 1, stk. 9 verður strikað. |
| | Í § 3 verður sum nr. 18 sett:<br>"18) Inntøka frá arbeiði fyri arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, um løntakarin antin rindar til NAV ella hevur eina eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi." |
| | § 7, stk. 4 verður orðað soleiðis: |

<table>
<tr>
<td>Stk. 4. Eftirlønarsamansparari í peningastovni kann einans hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv har partabrævaparturin fylgir talvuni niðanfyri.<br><br>
<table>
<tr><th>Aldur í ár</th><th>Partabrævapartur í mesta lagi</th></tr>
<tr><td>- 34</td><td>80 prosent</td></tr>
<tr><td>35 - 44</td><td>70 prosent</td></tr>
<tr><td>45 - 49</td><td>60 prosent</td></tr>
<tr><td>50 - 59</td><td>50 prosent</td></tr>
<tr><td>60 - 64</td><td>40 prosent</td></tr>
<tr><td>65 - 69</td><td>30 prosent</td></tr>
<tr><td>70 -</td><td>15 prosent</td></tr>
</table>
</td>
<td>“Stk. 4. Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, ið verða stovnaðar sbrt. hesi løgtingslóg, skulu verða samansettar soleiðis, at fíggjarligi váðin alla tíðina er hóskandi og gagnligur fyri samanspararan. Tá mett verður um, hvørt váðin er hóskandi, skal fyrilit havast fyri aldri, heilsu, fíggjarstøðu og øðrum viðkomandi viðurskiftum.”</td>
</tr>
<tr>
<td>Stk. 5. Tá partabrævaparturin hjá einum persóni er oman fyri hámarkið, sum er ásett í talvuni í stk. 4, verður rebalanserað.<br>Stk. 6. Persónur, yngri enn 60 ár, verður ikki álagdur at selja av partabrævagoymslu, hóast virðið av partabrævapartinum er oman fyri tað hægst loyvda. Rebalanserað verður soleiðis, at íløgur bert kunnu verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabrævaparturin er komin niður á hægst loyvda markið fyri partabrævapartin sambært stk. 4.<br>Stk. 7. Hjá persóni, ið er 60 ár ella eldri, skal íløgurøðin rebalanserast niður á hægst loyvda partabrævapart í seinasta lagi fyrsta handilsdag eftir, at persónurin er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár, sum ásett í talvuni í stk. 4.</td>
<td>Í § 7 verða stk. 5-7 strikað.<br>Stk. 8 og 9 verða eftir hettar stk. 5 og 6.</td>
</tr>
<tr>
<td>Tann persónur, sum er skyldugur til at rinda eftirlønargjald í Føroyum av inntøku, vunnin uttanlands undantikin § 1, stk. 9, verður góðskrivaður í eftirlønarskattinum fyri inntøkuskatt, persónur hevur goldið av eftirlønargjaldinum uttanlands.</td>
<td>Í § 12, stk. 2, 3. pkt. verður “undantikin § 1, stk. 9” strikað.</td>
</tr>
</table>